Bjarni Djurholm setti KT-ráðstevnuna 2004. Hann fegnast um áhaldandi menningina innan føroyska KT-vinnu

Mynd: Álvur Haraldsen

Vit hava prógvað okkara virði

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, fegnaðist í setanarrøðuni um áhaldandi menningina innan føroyska KT-vinnu. Hann greiddi millum annað frá, at tað almenna vil virka fyri, at alt samskifti millum almennar stovnar í framtíðini verður digitalt

KT-RÁÐSTEVNA
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Hósmorgunin fór KT-ráðstevnan 2004 av bakkastokki í Norðurlandahúsinum. Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm setti stevnuna. Í setanarrøðuni fegnaðist landsstýrismaðurin um áhaldandi menningina innan føroyska KT-vinnu.

Hann greiddi frá, at føroyska KT-vinnan hevur longu prógvað, at hon megnar at gera KT-loysnir bæði til føroyska heimamarknaðin og til at útflyta.

- Tað kemur ikki av ongum at ein KT-fyritøka á seinasta vinnudegi gjørdist ársins átak. Fleiri aðrar KT-fyritøkur hava ment nýskapandi loysnir. Eg kann nevna eitt nú umsiting-arskipanir, bókhalds- og roknsskaparskipanir, dátugrunnar, fíggjarstýringarskipanir, haldaraskipanir os. fr, vísti Bjarni Djurholm á.

Í fjør fekk KT-fyritøkan Formula heiðurin fyri ársins vinnuátak á árliga vinnudegnum. Formula fekk í fjør eina samstarvsavtalu í lag við risafyritøkuna Siemens. Talan var um eitt forrit til ein telefonvekslara.

Betri innlit

Bjarni Djurholm greiddi eisini frá, at ein av fremstu uppgávunum hjá føroysku KT- vinnuni í framtíðini er at geva føroyska brúkar-anum, vinnuni og tí almenna betri innlit í møguleikarnir, sum eru innan kunningartøkni.

- KT er fyri mong torgreitt og abstrakt. Tað henda áhaldandi broytingar og menning í vinnuni og tí er tað fyri mong torført at fylgja við, segði Bjarni Djurholm.

Vanta hagtøl

Landsstýrismaðurin í vinnumálum fýltist á, at eingi hagtøl eru tøk fyri føroyska KT-útflutningin. Hann helt tað verða av stórum týdningi, at føroyingar fingu hesi hagtøl til vega, tí annars verður nærum ógjørligt at lýsa hvønn leiklut KT-vinnan hevur í føroyska landsbúskapinum.

- Skal KT-vinnupolitikkurin verða eftirmettur og nýggj kós verða sett fyri framman, hevur tað týdning at fáa eit betri hagtalsgrundarlag um KT í Føroyum. Eg vil saman við KT-feløgum virka positivt fyri hesum, vísti landsstýrismaðurin á.

Hann legði afturat, at tað er eisini alneyðugt við hagtølum, tá útlendski samstarvsfelagar skulu meta um møguleikarnar fyri samstarvi við føroyskar KT-fyritøkur.

Alt samskifti digitalt

Í setanarrøðuni róði Bjarni Djurholm eisini framm undir, at tað almenna hevur fleiri verkætlanir innan KT í gongd. Hann nevndi eitt nú, at Skráseting Føroya tekur nýggja partafelagsskrásetingarskipanin í nýtslu í næstum, sum føroysk KT-fyritøka hevur ment.

Landsstýrismaðurin helt fyri, at tað almenna eigur at ganga undan at gagnnýta kunningartøkni.

- Borgarin skal uppliva tað almenna sum eina eind. Vit skulu tryggja, at borgarin fær opinleika, atgongd og møguleika fyri avgreiðslu av flestu viðurskiftunum á internetinum. Umsitingin skal við KT verða skipað soleiðis at atgongd verður til data tvørturum ráð og stovnar. Hetta skal tryggja, at data verður skrásett á einum stað og tí verður ikki neyðugt at skráseta data aftur á øðrum staði, segði Bjarni Djurholm.

Málið er, at alt samskiftið millum almennar stovnar skal verða digitalt. Skal málið røkkast verður neyðugt við einum veitara av talgildari undirskrift (digitalum signaturi) í Føroyum, vísti landsstýrismaðurin í vinnumálum á.

Ynskja betri samskifti

Vegna Vinnumálaráðið bjóðaði Bjarni Djurholm føroysku KT-vinnuni til støðugari samskifti, so føroyska vinnan og tað almenna framhaldandi og í størri mun kundu gagnnýta kunningartøkni

- Avgerðir um, hvørjar íløgur tað almenna og vinnan skulu gera í framtíðini krevja vitan, vilja og førleika. Vit góðum samstarvi millum tað almenna og KT-vinnuna eri eg sannførdur um, at hesar avgerðir verða tiknar á haldgóðum grundarlag, segði Bjarni Djurholm at enda.

FAKTA um KT-stevnuna 2004

KT-stevnan varð sett í gjár í Norðurlandahúsinum og heldur fram í dag. 15 føroyskar KT fyritøkur og samskiftisútboðarar luttaka á stevnuni.

Á KT-stevnuni verða fyrilestrar, framløgur, framsýningar, kjak, kalt borð og ráðstevnan endar fríggjakvøldið við veitslu á Hotel Føroyum.

Meira fæst at vita um ráðstevnuna á www.kt.fo

Leggja sjúklingafeløg saman

Ætlanir eu um at leggja feløg fyri giktsjúklingar saman. Talan er um Giktafelagið og felagið fyri fólk við sjúkuni Morbus Bechterew, sum er giktsjúka, sum í stóran mun rakar ryggjageislarnar

SJÚKLINGAFELAG
Edvard Joensen

Unn Hansen er skrivari í felagnum Morbus Bechterew í Føroyum. Hon sigur, at tey nú arbeiða við at leggja felagið saman við giktafelagnum

Nú felagið Morbus Bechterew verður 20 ár tann 19. mai, eru ætlanir samstundis um at leggja saman við Giktafelagnum. Talan er í báðum førum um feløg fyri fólk, sum líða av giktsjúkum.

Felagið fyri Morbus Bechterew sjúklingar fer at hava aðalfund í MBF húsinum flaggdagin klokkan 14.00, sigur skrivarin í felagnum, Unn Hansen.

Talan er um eitt lítið felag, tí ikki so øgiliga nógv fólk hava sjúkuna ella kenna nakað til hana. Tískil heldur ikki til felagið, sum nú í 20 ár hevur verið fyri fólk við sjúkuni.

Unn Hansen sigur, at í hennara føri hevur felagið verið til góða hjálp. Serliga við uplýsing um sjúkuna og um viðgerðarhættir, sum fáast kunnu.

Sjúkan er arvalig, sigur Unn Hansen. Tað vísir seg, at hon ofta verður staðfest í ávísum familjum, og so kunnu nógv fólk í somu familju fáa hana. Og kortini er so onkur, sum heilt sleppur undan.

Í Føroyum fáa sjúklingar tilboð um tvær ferðir fjúrtan daga viðgerð árliga á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sigur Unn Hansen. Tann viðgerðin umfatar viðgerð hjá fysioterepeuti og eitt nú svimjing. Serliga svimjing í heitum vatni hjálpir summum væl. Men so eru tað onnur, sum hava tað best við nógvum kulda. Tað vil sig, at ísur verður lagdur á sjúku støðini, greiðir Unn Hansen frá.

Morbus Bechterew (Spondylitis ankylopoietica) er eitt serligt slag av liðagigt, sum ofta vísir seg sum pína í rygginum,ið ikki hvørvur, hóast ein hvílir seg. Ryggurin stívnar ofta hjá fólki, sum hava sjúkuna. Og so ger sjúkan eisini, at sjúklingurin hevur avmarkaðar møguleikar at róra seg.

Orsøkin er bruni í liðbondum, eins og í ryggi og bringu. Umleið triðji hvør sjúklingur verður eisini raktur í knø, mjadnar og herðar.

Morbus Bechterew er varandi sjúka, og gongdin kann vera ymisk frá fóki til fólk.

Sagt verður, at umleið 0,1 til 0,5 prosent av fólkatalinum verða rakt av Morbus Bechterew. Ofta sæst sjúkan í 20-30 ára aldrinum, og mest hjá monnum. Tað kemst kanska av, at sjúkan fer betri við kvinnum, og at tað tí ikki altíð verður rakt við hana.

Hóast fólk kunnu ganga í rættiliga nógv ár við sjúkuni, er vanligt, at tey eru arbeiðsfør alla sína tíð kortini.

Føroyska felagið fyri fólk við Morbus Bechterew fer umframt aðalfundin, sum verður sunnudagin, eisini at halda 20 ára dagin við eini veitslu, sum verður í húsum hjá Starvsmannafelagnum tann 15. mai, sigur Unn Hansen skrivari í Morbus Bechterew felagnum.

Risastórt hall hjá Maersk Air

Maersk Air hevði eitt hall upp á 622 milliónir í fjør. Tað er ikki nøktandi úrslit, sigur felagið

Maersk Air hevur sum lið í herferðini at lýsa »nýggja« felagið millum annað málað nýggju flogførini, sum flúgva niður í Europa, við nýggjum litum

Tað hevur gingið illa hjá danska flogfelagnum Maersk Air seinnu árini. Og árið í fjør var einki undantak í so máta. Eitt samlað hall upp á 622 milliónir er tað, felagið kann vísa á í roknskapinum, sum júst er kunngjørdur.

Sjálvur raksturin gav eitt hall upp á 215 milliónir. Umframt komu so aðrir serligir postar sum niðurskriving av flogførum og søla av einum dóttur felag í Englandi, sum kostaði Maersk Air pengar.

Í tíðindaskrivi í samband við roknskapin sigur Maersk Air, at tað hóast alt var okkurt, sum dróg uppeftir í roknskapinum.

Millum annað seldi Maersk Air flogfelagið Estonian Air og tilhoyrandi tænastur, og gav tað felagnum nakrar milliónir í kassan. Eisini er eginkapitalurin vaksin frá 464 milliónum í 2002 til 531 milliónir við ársenda 2003, sigur Maersk Air. Men tað var kortini nakað langt frá at vera nokk til at fáa raksturin at standa upp og niður, ella at halda sær á flogið, sum tey plaga at siga í hasi vinnuni.

Kortini fellur stjórin í felagnum ikki í fátt. Finn Øelund er nýggjur í starvinum, og hann hevur hug at líta frameftir, sigur hann í tíðindaskrivi í samband við roknskapin.

Hann setir sítt álit á nýggja átakið, har felagið verður lýst sum eitt framtakshugað felag við nýggjum hugsunarháttum.

Maerska Air er farið undir rættiliga umfatandi lýsingarherferð fyri at fáa fólk at nýta felagið, tá ferðast verður úr Danmark suður eftir í Europa. Rutunetið hjá felagnum veksur støðugt, og umfatar í dag 28 rutur í 25 høvuðsstøðum og stórbýum suðuri í Europa. Og ætlanin er at byrja 10 nýggjar rutur afturat í heyst. Alt til stórbýir í Europa, sigur Maersk Air í tíðindaskrivi í samband við roknskapin, sum komin er.

Maersk Air kappast eisini við Atlantsflog um ferðafókini á rutunum millum Føroyar og Danmark. Tað hevur ikki gingið serliga væl á hesi rutuni heldur hjá felagnum. Men sum skilst á fólki á skrivstovuni hjá Maersk Air í Havn, er líkt til, at nýggja lýsingarátakið eisini hevur rinið við her. Tí ferðafólkatalið tykist vaksandi við flogførunum hjá Maersk Air, siga tey.